## Dystur hjá Toda avlýstur

Tað stendur so illa til við fólki hjá Lillestrøm, at ætlaði venjingardysturin ímóti Start sunnudagin helst verður avlýstur. Sambært venjaranum hjá Lilleøstrøm er støðan so ring, at liðið bara hevur sjey mans tøkar í løtuni, og tí klára teir ikki at manna lið til dystin sunnudagin. Endaliga avgerðin um dystin er ikki tikin, men Start er farið at leita eftir einum øðrum liði at spæla ímóti sunnudagin.

## Gott fyri sjálvsálitið

Sum um italienskir fótbóltsspælarar ikki hava nóg gott sjálvsálit, so sigur italski landsliðsvenjarin, at stórsigurin á Týsklandi mikukvøldið var góður fyri sjálvsálitið hjá sínum spælarum. Italia vann venjingardystin ímóti Týsklandi við heili 4-1, og himmalbláa liðið, sum Føroyar skulu spæla ímóti í næstu EM-kappingini, tykist verða krútsterkt og væl trimmað til HM-endaspælið í summar.

– Vit spældu ímóti einum góðum týskum liði. Teir góvu okkum trupulleikar síðst í dystinum, men eg eri væl nøgdur, og tað er nakað serligt við hesum sigrinum, sigur Mercello Lippi.

## Klinsmann verjir sínar mans

Týski landsliðsvenjarin Jürgen Klinsmann sá sítt lið verða avbukað av Italia í venjingardysti mikukvøldið, men Klinsmann hevur ikki mist vónina um eitt gott úrslit í HM-endaspælinum á heimavølli.

– Vit mugu taka skyldina fyri hetta stórtapið á okkum, men vit halda fram við sama ídni, og eg havi fult álit á mínum spælarum, sigur Klinsmann.

Týsku fjølmiðlarnir vóru tó ikki mjúkir at strúka eftir stórtapið mikukvøldið. Blaðið Bild skrivaði, at spælararnir ikki høvdu uppiborið sína løn, og serliga lyklaspælarin Michael Ballack fær av at vita. Bild skrivar, at Ballack hevur sama virði sum ein pizza.

– Tit hava gjørt Týskland fyri skommum, skrivaði Bild í sínari bersøgnu umrøðu av dystinum.

# Fleyr kann tryggja sær FM

**Um Fleyr vinnur dystin í meistaradeildini hjá monnum ímóti SÍ sunnudagin, eru teir føroyameistarar. Dráttur kann taka eitt stórt fet ímóti FM í meistaradeildini hjá kvinnum við at vinna á SÍ sunnudagin**

FLOGBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


*Menninir hjá Fleyr kunnu um vikuskiftið tryggja sær FM-heitið í meistaradeildini í flogbólti*

Flogbóltskappingin gongur ímóti endanum, og longu hetta vikuskiftið kunnu avgerðirnar falla um føroyameistaraheitini hjá bæði monnum og kvinnum.

Tvey umfør eru eftir at spæla hjá monnum, og har kann Fleyr avgera alt í dystinum ímóti SÍ sunnudagin.

Fleyr er eitt stig framman fyri Mjølnir, men hevur ein dyst til góða. Tí skal Mjølnir hava eina stóra hjálpandi hond frá SÍ, um teir skulu varðveita møguleikan at vinna FM.

Fleyr skal bara vinna dystin sunnudagin, og so er FM-heitið komið heim. Eydnaðist ikki Fleyr at vinna, so verður talan um eina veruliga finalu um FM-heiti í síðsta umfarinum, tá tey bæði fremstu liðini, Mjølnir og Fleyr, spæla í Klaksvík.

Ein annar dystur verður um vikuskiftið, og hann er ímillum Nøvuna og ÍF.

### Dráttur nær við gullið

Hjá kvinnum hevur Dráttur ligið fremst alt kappingarárið, og hóast liðið í seinasta umfari tapti púra óvænta ímóti KÍF, kann liðið avgera alt sjálvt.

Dráttur spælir ímóti SÍ sunnudagin, og kvinnurnar úr Drátti kunnu taka eitt týðandi fet fram ímóti FM-heitinum við at vinna hendan dystin.

Einasta liðið, sum kann fáa Drátt aftur, eru steypavinnararnir úr TB, og tær skulu sunnudagin spæla ímóti Mjølni á heimavølli.

Ein annar dystur er hjá kvinnum, men hann hevur ikki so stóran týdning, tí hann er ímillum tey bæði niðaru liðini KÍF og ÍF.

**Meistaradeild kvinnur**

| | D | V-T | Sett | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1. Dráttur | 17 | 15-2 | 48-22 | 20 |
| 2. TB | 17 | 10-7 | 37-24 | 16 |
| 3. SÍ | 17 | 10-7 | 37-31 | 13 |
| 4. ÍF | 17 | 9-8 | 37-31 | 12 |
| 5. KÍF | 17 | 4-13 | 20-44 | 7 |
| 6. Mjølnir | 17 | 3-14 | 18-45 | 4 |

**Meistaradeild menn**

| | D | V-T | Sett | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1. Fleyr | 13 | 11-2 | 35-15 | 15 |
| 2. Mjølnir | 14 | 9-5 | 33-17 | 14 |
| 3. SÍ | 13 | 8-5 | 30-20 | 10 |
| 4. ÍF | 13 | 5-8 | 21-28 | 7 |
| 5. Nøvan | 13 | 0-13 | 00-39 | 0 |

# Nýggj FM-kapping í fimleiki

**Fríggjakvøldið verður kapping um føroyameistaraheitið í estetiskum fimleiki fyri gentur. Kappingin verður hildin í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, og luttakandi liðini eru Havnar Fimleikafelag og Ljósið úr Havn og Støkk úr Runavík**

FIMLEIKUR

*Tíðindaskriv*

Kappingin í estetiskum fimleiki er so nýggj í Føroyum, at hetta er fyrsta ferðin, at kappast verður um føroyameistaraheitið innan hetta slag av fimleiki. Kappingin verður 3. mars kl. 19.30.

Formurin er broyttur nakað frá Grand Prix fimleikinum, sum vit áður hava sæð nógv til í Føroyum. Fyri tað fyrsta so onki krav í ár at íðkararnir skulu gera eina íðkan við amboðum, og í øðrum lagi er karmurin kring íðkanina øðrvísi. Ljóskastarar verða settir fram við gólvinum, og høllin verður myrkaløgd. Hetta gevur ein heilt øðrvísi og hátíðarligan dám til kappingina. Heldur ikki íðkararnir eru teir somu á at líta, sum teir vóru fyrr. Nógv verður gjørt burtur úr búnum og sminku, fyri at fáa fram tann tóna, sum fimleikararnir lýsa við íðkanini.

### Venja øðrvísi

Eisini sjálvur fimleikurin er øðrvísi, tí í estetiskum fimleiki eru rørslurnar meira líkar teimum, vit eru von við at síggja í sjónvarpinum enn teimum, vit eru von við at síggja í hallunum her heima. Hetta hevur eisini havt við sær stór krøv til venjarar og fimleikarar við øðrvísi og nógv meiri venjing hjá gentunum, venjingin hevur verið upp til 4-5 ferðir um vikuna, tí meira skal gerast við styrki og liðiligheit, og kroppurin verður sum heild nýttur á ein øðrvísi hátt enn áður.

Hesin háttur at venja er nýggjur fyri øll í Føroyum, so bæði einstøku feløgini og fimleikasambandið hava fingið hjálp frá venjarum og dómarum frá londum, ið eru meira køn innan estetiskan fimleik, og fyrstu úrslitini av hesum arbeiði vera at síggja fríggjakvøldið.

### Kappast í HM

Sjálvt um kappingin verður fríggjadagin, er ikki komið á mál hjá føroysku gentunum. Øll trý lið fara 21 mars til Tallin í Estlandi, har tey skulu kappast í heimsmeistarakappingini fyri lið, so føroyameistaraheitið er bert eitt stig á einari leið


*FM í estetiskum fimleiki verður fríggjakvøldið*

við stórum avbjóðingum fyri føroyskan fimleik.

Fyri at stytta um stundir hjá áskoðarunum meðan dómararnir gera sítt í kappingini, verða trý lið av dansarum frá Tvøroyra fimleikafelag við.